Grundarsteinur

UMHVØRVI

## Innihaldsyvirlit

Aðalmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 161
Samandráttur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 161
Partmál . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 161
Umhvørvið og umheimurin . . . . . . . . . . . . . 162
Lendisskipan og fjølbroytt náttúra . . . . . . . . . 163
Tilfeingi og nýtsla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 166
Orka og veðurlagsbroytingar . . . . . . . . . . . . . 160
Jørð, hav, luft og vatn . . . . . . . . . . . . . . . . . . 162
Vinna og útlát . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 163
Alment og kommunalt virksemi . . . . . . . . . . 165
Kunning og samskifti . . . . . . . . . . . . . . . . . . 166
Fyrisiting og gjøld . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 169

# Aðalmál

Umhvørvið skal vera frítt fyri mannaelvdari dálking og náttúruinntrivum, sum kunnu hótta heilsu menniskjanna og fjølbroytni og vakurleika náttúrunnar

## Samandráttur

Endamálið við frágreiðingini er at lýsa tað aðalmál og ta ætlan fyri umhvørvið, sum mælt verður Landsstýri og Løgtingi at taka undir við, so verulig stig kunnu takast fyri at røkka aðalmálinum fyri umhvørvið í 2015.

Aðalmálið er, at umhvørvið skal vera frítt fyri mannaelvdari dálking og náttúruinntrivum, sum kunnu hótta heilsu menniskjanna og fjølbroytni og vakurleika náttúrunnar.

Fyri at røkka aðalmálinum, eru fleiri mál eyðmerkt, ið hvørt sær mugu verða uppfylt, fyri at aðalmálið kann gerast veruleiki. Tilmæli til arbeiðsætlanir eru eisini gjørd, so til ber at leggja arbeiðið til rættis longu frá komandi fíggjarári. Verður tilmælið fylgt, nærkast vit aðalmálinum longu í 2015.

Fyri at aðalmálið skal gerast veruleiki, verður mælt til, at Føroyar vera millum fremstu lond at virka fyri einum reinum havi og at tálma veðurlagsbroytingum, umframt at verja lívfrøðiliga margfeldið. Føroyar mugu vera virknar í altjóða umhvørvisarbeiði og tryggja, at lóggávan verður hildin og regluliga dagførd.

Ein týðandi partur í at røkka settu málunum, er at kunna einstaka borgaran betur um náttúru og umhvørvi. Fjølbroytta, føroyska náttúran skal tryggjast og varðveitast fyri verandi og komandi ættarlið við at gera eina yvirskipaða lendisætlan fyri alt landið. Tjóðgarðar og frítíðarøki verða partar av hesi ætlan. Eisini er umráðandi, at livandi sum deytt tilfeingi verður umsitið á burðardyggum grundarlagi.

Í 2015 skulu 15% av orkunýtsluni stava frá varandi orkukeldum, og útlátið av veðurlagsgassum skal vera 8% minni enn í 1990. Jørð, hav, luft og vatn skulu vera so rein, at tey hvørki eru til ampa ella skaða fyri fólk, fæ, náttúru ella mannaverk. Dálkandi útlát skulu skrásetast, stýrast og skerjast. Umhvørvisatlit skulu takast í mun til alment og kommunalt virksemi, eins og vinnan somuleiðis skal taka umhvørvisatlit.

At enda verður mælt til, at umhvørvis-, lendis- og náttúrumál verða løgd í eina umsiting, sum er før fyri at fremja sett mál, bæði hvat viðvíkir arbeiðs- og fíggjarorku.

## Partmál

Orðað eru partmál um:

- Umhvørvið og umheimin
- Lendisskipan og fjølbroytta náttúru
- Tilfeingi og nýtslu
- Orku og veðurlagsbroytingar
- Jørð, hav, luft og vatn
- Vinnu og útlát
- Alment og kommunalt virksemi
- Kunning og samskifti
- Fyrisiting og gjøld

## Umhvørvið og umheimurin

Í 2015 sær umheimurin Føroyar sum eitt land, ið virkið arbeiðir fyri einum reinum umhvørvi, bæði tjóðarliga og altjóðaliga

Føroyar skulu vera millum fremstu lond at virka fyri einum reinum havi, at tálma veðurlagsbroytingum og at verja lívfrøðiliga margfeldið.

Tað ber millum annað í sær, at:

- Føroyar skulu vera virknar í norðurlendskum og altjóða samstarvi á nevndu økjum
- Føroyar skulu marknaðarføra nevndu mál sum aðalmál síni sum fiskivinnu- og ferðavinnuland
- Føroya skulu virka fyri, at eisini onnur lond seta sær somu aðalmál fyri at verja áhugamál okkara sum fiskivinnu- og ferðamannaland
- Føroyar skulu fremja altjóða krøv sambært longu staðfestum sáttmálum í lóggávu og fyrisiting síni

### Støðan í dag

Støðan í dag er, at Føroyar formliga eru bundnar av alskyns skyldum, sum eru ásettar í altjóða og millumtjóða sáttmálum, men at vit ikki – ella bert lutvíst – hava framt hesar skyldur í lóggávu okkara. Avleiðingin er, at illa ber til at handhevja krøvini mótvegis borgarunum. Í øðrum førum er støðan hon, at vit annaðhvørt ikki hava tikið støðu til ella tikið undir við ávísum altjóða sáttmálum av hesi ella hasi orsøk. Avleiðingin er, at vit sum land ikki vinna virðing í umheiminum, heldur øvugt. Lata vit støðuna standa við, fer hetta at skaða trúvirði og umdømi okkara í umheiminum. Í ringasta føri kann vánaliga umdømið raka føroyskt vinnulív við inntøkumissi og útistongsli.

### Avbjóðingar og trupulleikar

Fyrsta avbjóðingin verður at raðfesta umhvørvismál í fyrisiting og gransking, so at vit gerast før fyri at fremja teir sáttmálar, sum longu eru samtyktir í Løgtinginum. Næsta avbjóðingin verður at byggja upp førleika og vitan, so at vit í framtíðini kunnu taka virknan lut í altjóða og norðurlendskum felagsskapum og gera okkara ávirkan galdandi fyri at fremja sett mál. Ein slík luttøka má samskipast tvørtur um ráðs- og stovnsmørk fyri at gagnnýta ta vitan, sum kanska er spjødd í almennu fyrisitingini.

Størsti trupulleikin er, at Løgtingið higartil ikki gevur umhvørvismálum hægri fíggjarliga raðfesting enn umleið 0,8% av fíggjarlógini. Úrslitið av hesum lítla umhvørvisáhuga er lýst beint omanfyri. Ein annar trupulleiki er, at lítið og einki politiskt kjak er um umhvørvismál. Avbjóðingin hjá politisku skipanini verður tí at seta umhvørvismál á dagsskrá, samtykkja tey við eini breiðari semju og at virka fyri, at peningur verður játtaður, so at málini kunnu røkkast.

### Ætlan hiðani til 2015

Fyri at røkka setta málinum, at Føroyar skulu vera millum fremstu lond at virka fyri einum reinum havi, at tálma veðurlagsbroytingum og at verja lívfrøðiliga margfeldið, mugu vit leggja eina ætlan, sum vit eru før fyri at halda og fremja hiðani og til 2015. Árligar eftirmetingar av sáttmálaskyldum Føroya og fremjan av hesum skyld-

um í lóggávu og fyrisiting eiga at verða gjørdar. Ein støðufrágreiðing eigur at verða gjørd til hvørt løgtingsval og latast Løgmansskrivstovuni, so til ber hjá komandi landsstýrum at fáa skjótt yvirlit yvir, hvussu langt er eftir á mál.

### 1. stig: 2007

Fyrsta stig er at skapa eitt fullfíggjað yvirlit yvir altjóða skyldur Føroya sambært longu samtyktum sáttmálum, at eyðmerkja sáttmálar, sum vit mugu taka undir við fyri at røkka setta málinum og at eyðmerkja tørvin á lóggávu, sum má smíðast fyri at fremja sáttmálarnar.

### 2. stig: 2008-2010

Annað stig er at fremja lógarbroytingar og umsitingarligar tillagingar, sum eru neyðugar fyri at vit – mótvegis okkum sjálvum og umheiminum – kunnu staðfesta og prógva, at vit hava framt altjóða skyldur.

### 3. stig: 2008-2013

Triðja stig er at menna fyrisiting og gransking munandi, so at vit gerast fakliga før fyri at seta føroyskan dám á norðurlendskt og altjóða samstarv um verju av havinum, luftini og lívfrøðiliga margfeldinum.

### 4. stig: 2013-2015

Fjórða stig er at sjónliggera átøk og framstig, sum vit gera úti sum heima til at verja hav, luft og lívfrøðiligt margfeldi. Ein røtt og miðvís framsýning úti í heimi fer at gagna bæði landi, fólki og fyritøkum. Føroyar skulu bjóða seg fram sum vert og fyriskipara fyri norðurlendskum og altjóða ráðstevnum og fundum um umhvørvi.

## Lendisskipan og fjølbroytt náttúra

Tann fjølbroytta, føroyska náttúran skal tryggjast og varðveitast fyri verandi og komandi ættarlið við at gera eina yvirskipaða lendisætlan fyri alt landið

Tað ber í sær, at:

- Landið skal býtast í økir til ymisk nýtslu- og frítíðarendamál
- Lendisskipanin verður gjørd soleiðis, at lívfrøðiliga margfeldið verður vart
  sambært altjóða sáttmálum
- Lendisskipanin skal við ymiskum stigum av friðingum tryggja varðveitslu av serføroyskum ílegum í djórum og plantum. Henda varðveitsla krevur eisini strangt eftirlit við innflutningi av livandi verum
- Fyrilit skulu eisini takast fyri jarðfrøðiligum og fagurfrøðiligum virðum í lendinum
- Lendisskipanin skal vera soleiðis háttað, at til ber at hava frítíðarvirksemi, heilsubótarvirksemi og ferðavinnu innan fyri ásettar karmar

### Støðan í dag

Í dag er eingin yvirskipað lendisætlan, tí fækkast talið á náttúruperlum, so hvørt sum størri lendisinntriv verða gjørd í sambandi við størri og smærri byggiverkætlanir, vegagerðir og havnagerðir. Harafturat kann ein niðurgongd verða í lívfrøðiliga margfeldinum um fá ár, og tað kann hava við sær, at vit halda ikki altjóða sáttmálar, ið Føroyar hava undirskrivað.

Bý- og bygdaráð hava í løtuni ábyrgdina av ráðlegging fyri nærøkið, og hvussu henda ráðlegging er, veldst um førleikan í fyrisitingini og hjá politikarunum.

Í Føroyum eru friðingarnevndir og yvirfriðingarnevnd. Í yvirfriðingarnevndini sita landsfornfrøðingurin og leiðarin á Náttúrugripasavninum. Møguleiki er at velja fleiri fakfólk í nevndina. Formaður nevndarinnar er sorinskrivarin. Hesar nevndir taka egnar avgerðir við støði í løgtingslóg nr. 48 frá 9. juli 1970 um náttúrufriðing, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995. Friðingar eru gjørdar sambært friðingarlógini av t.d. Mølheyggjunum á Sandi, men her er nærum eingin upplýsing og eingin handhevjing av hesi friðing, og tí kunnu partar av varðveitingarvirðinum fara fyri skeyti, um ikki skjótt verður atborið við sjónligari og munadyggari verju. Tey ymisku búøkini á friðaðum sum ófriðaðum økjum eru hvørki kortløgd ella skeltað, og eingin allýsing er gjørd fyri, hvussu hesi skulu kortleggjast og skeltast.

Tað eru ymisk áhugamál, sum skapa trupulleikar í náttúruni, av tí at ongar yvirskipaðar reglur eru. Eitt nú tann ávirkan, sum landbúnaður og seyðahald kunnu hava á náttúruna, til dømis taðing, jarðarmáan, møguleikar at fyribyrgja jarðarmáan við at planta, og so tað at verja føroyskar upprunaplantur og varðveita eina fjølbroytta náttúru. Ein yvirskipað stýring av lendisnýtsluni hevði harumframt styrkt vistskipanirnar í náttúruni.



Í hálendi er staðfest ein vaksandi jarðarmáan. Her eru samanfallandi áhugamál hjá seyðahaldi og náttúrufriðing at fáa greitt henda trupulleika.

### Avbjóðingar og trupulleikar

Ein lendisskipan eigur at fáa hægstu raðfesting, av tí at hon er fyritreyt fyri munadyggari verju av lívfrøðiliga margfeldinum, ið aftur er ein fyritreyt fyri, at vistskipanirnar kunnu røkjast á burðardyggan hátt. Ein lendisskipan er eisini átrokandi neyðug, um jarðarmáan skal fyribyrgjast.

Tað verður ein avbjóðing at fáa ymisk øki friðað, serliga um tað fer at hava fíggjarliga ávirkan á einstakar kommunur, persónar ella fakbólkar. Hinvegin kunnu friðað øki kasta meiri pening av sær í ferðavinnuni.

Ein tann størsta avbjóðingin er at fáa eina lendisfyrisiting við høgari tign at virka, sum hevur gott samskifti við kommunur og vinnu, herundir ferðavinnu. Hetta merkir, at fakfólkini – eitt nú í náttúruverndarráðnum – læra at geva ein greiðan og lættskiljandi boðskap til politikarar og borgarar, og at politikarar geva tilsøgn til at lurta eftir fakfólki.

Í friðaðum øki mugu serstakar reglur gerast fyri atkomu hjá fólki og fæi. Tó mugu varðagøtur framvegis vera opnar hjá øllum at ganga eftir.

### Ætlan hiðani til 2015

### 1. stig: 2007-2010

Tey ymisku búøkini mugu kortleggjast. Síðan kann støða takast til meira ella minni umfatandi friðingar. Føroyar skulu lýsast og skipast í hesar flokkar:

1. Bústaðarøki[1]
2. Øki til alment endamál, eitt nú stovnar
3. Landbúnaðarøki[1]
4. Vinnu- og ídnaðarøki[1], herundir staðfesting av vindmyllum, alduorku o.s.fr.
5. Frítíðarøki – undir náttúruvernd[2]
6. Tjóðgarðar, t.d. lívfrøðiligar, jarðfrøðiligar, fagurfrøðiligar og søguligar fortreytir

[1] Her vendist vanliga ikki aftur, tí upprunaliga náttúran er broytt nógv av byggivirksemi; men í tílíkum øki eiga at geva møguleikar fyri at planta smærri og størri viðarlundir, umframt at gera grøn økir.
[2] Hvannhagi, Suðuroyarbjørgini, Sandoyarbjørgini, Fjallavatn, Eiðiskollur, Reyðafelstindur og Skúvadalur eru nøkur uppskot til tjóðgarð.
[3] Eitt sjálvsagt evni til World Heritage Site er Mykineshólmur (og drangarnir við hann) og økið vestur frá Mykinesbygd.

7. Alfriðað øki (World Heritage Sites), ið er fullkomiliga friðað øki fyri alla mannaættina, og sum verða ásett í altjóða samstarvi[3]

Økisflokkarnir 1, 2, 3 og 4 fevna um ætlanir hjá kommunum, og teir mugu tí lýsast og skipast í samstarvi við tær. Ein verja av økisflokkunum 5, 6 og 7 er í høvuðsheitum landsmál, og mælt verður til at fara fram á henda hátt:

*Frítíðarøki (økisflokkur 5):* Her kunnu avmarkaðar friðingar av lendi og livandi tilfeingi gerast. Ein reglugerð skal tryggja framdu friðingarnar, soleiðis at økið kann nýtast til frítíðarendamál, ferðavinnu, gongutúrar, ríðing, renning, skótavirksemi o.a.

*Tjóðgarðar (økisflokkur 6):* Her kann ein gera friðingar á lutfalsliga stórum økjum, sí dømi omanfyri. Friðingarnar eru grundaðar á eina samansetta meting av lívfrøðiligum margfeldi, jarðfrøðiligum eyðkenni og fagurfrøðiligum og søguligum virði. Áir, vøtn og strandalinja mugu somuleiðis takast við. Tílík støð hava stóran týdning fyri ferðavinnuna. Varðagøtur skulu eisini verða opnar hjá øllum at ganga eftir.

*Alfriðað øki (økisflokkur 7):* Samráðingar verða tiknar upp við stovnar, ið umsita hesi mál í heimshøpi, (ST, UNESCO). Eitt føroyskt øki skal veljast til hetta endamál. Strategibólkurin fyri umhvørvi hevur Mykineshólm og útsuðurpartin av oynni Mykines sum uppskot. Eitt tílíkt stað hevði økt munandi um umdømi Føroya sum eitt ferðamál hjá øllum heiminum.

Lýsast skal lívfrøðiliga margfeldið í økjum, ið verða skotin upp at hoyra til økisflokkarnar 4 (frítíð), 5 (tjóðgarður) og 6 (alfriðað øki). Hetta svarar til eina kortlegging av búøkjum og skal gerast fyri hvørja oyggj sær. Tær gjørdu lýsingarnar/kortleggingarnar verða síðan støði undir, hvønn flokk, ið uppskotnu økini koma í. Hesi tiltøk bera í sær, at Føroyar lúka partar av undirskrivaða sáttmálanum um at varðveita lívfrøðiligt margfeldi.

Fyri uppskotnu økini verða síðan gjørdar lýsingar og metingar av jarðfrøðiligum, fagurfrøðiligum og søguligum virði.

Ein vekting av nevndu lýsingum og metingum ger at enda av, í hvønn bólk uppskotnu økini skulu fara. Hetta arbeiðið endar við einum tilmæli til náttúruumsitingina um, hvørji øki skulu gerast frítíðarøki (við møguligari avmarkaðari friðing), tjóðgarður (við víðkaðari friðing) ella alfriðað øki.

### 2. stig: 2010-2015

Føroyska náttúruumsitingin tekur tilmæli til viðgerðar og evnar til lógaruppskot, ið binda land og kommunur at náttúruvernd, ið verður framd við frítíðarøkjum, tjóðgørðum og alfriðaðum økjum. Við eru bæði land, strond og havbotnur. Ætlanir fyri bústaðarøkir, landbúnaðarøkir, vinnu- og ídnaðarøkir skulu gerast av kommununum fyri 2012 og í samsvari við lendisskipanina. Ein breið løgtingssemja má finnast innan 2012.

[3] Eitt sjálvsagt evni til World Heritage Site er Mykineshólmur (og drangarnir við hann) og økið vestur frá Mykinesbygd.

# Tilfeingi og nýtsla

## Livandi sum deytt tilfeingi skal umsitast á burðardyggum grundarlagi

Tað ber í sær, at:

- Nútíðar tørvur skal nøktast á skilagóðan hátt, uttan tó at minka um møguleikarnar hjá komandi ættarliðum
- Tilfeingisnýtslan skal ikki elva til tilfeingisspill

### Støðan í dag

Støðan í dag er, at Føroyar ikki lúka altjóða viðurkendar ásetingar um burðardygt grundarlag, soleiðis sum tær eru lýstar í sonevndu Brundtlandfrágreiðingini.[4]

Burðardygg menning eru evnini at nøkta nútíðarinnar tørv, uttan at minka um møguleikarnar hjá komandi ættarliðum at nøkta sín tørv. Burðardygg menning skal viga tørvin hjá samfelagnum, búskapinum og umhvørvinum upp ímóti hvør øðrum.

Sum er, eru hesar ásetingarnar ikki staðfestar í lóggávu ella sum umsitingarlig meginregla í Føroyum. Úrslitið er, at sama, um talan er um livandi ella deytt tilfeingi sum sand, grót, kol, plantur, smádjór, fugl, fisk, hval o.s.fr., so er eingin landsstýrismaður ella umsiting, sum tryggjar, at tilfeingið verður umsitið á burðardyggum grundarlagi.

Hugsjónin um eina alheimsliga burðardygga menning er ein heimur við búskaparligari framgongd, størri vælferð og øktari umhvørvisvernd.

Útgivin er ein norðurlendsk frágreiðing um ávísingartøl. Ávísingarevnini kunnu nýtast at meta um, hvussu støðan er við burðardyggari menning í dag, og til at lýsa, um støðan fer at batna ella versna í framtíðini.

Í hesum sambandi kann verða nevnt, at løgmaður í 1998 undirskrivaði »Statsministerdeklaration om ett hållbart Norden.«

### Avbjóðingar og trupulleikar

Fremsta avbjóðingin er at fáa yvirlit yvir støðuna í dag, og síðan í lóggávu og umsiting at seta í verk viðkomandi ávísingarevnið, so at tað frá almennari síðu ber til at tryggja og skjalprógva, at tilfeingið verður umsitið á burðardyggum grundarlagi.

Strategibólkurin fyri tilfeingi ásetur tað mál, at tilfeingið skal verða umsitið soleiðis, at vit varðveita endurnýggjandi tilfeingið og skaða umhvørvið sum minst.

### Ætlan hiðani til 2015

Fyri at røkka málinum um at Livandi sum deytt tilfeingi skal umsitast á burðardyggum grundarlagi, má ein hugburðsbroyting til.

Fyri at broyta hugburðin, er neyðugt við ítøkiligum ætlanum um kunning. Ein ætlan má leggjast, sum kann gjøgnumførast. Eftirmetingar av ábendingarvirðunum eiga at verða gjørdar javnan, so til ber at fáa yvirlit yvir, hvussu støðan er.

### 1. stig: 2007-2011

Fyrsta stig er at staðfesta ásetingarnar um burðardygga menning í lóggávu og sum umsitingarliga meginreglu. Somuleiðis er umráðandi at staðfesta, hvørjar ábend-

[4] ST frágreiðing, vanliga nevnd Brundland frágreiðingin.
Our common future, Report of the World. Commision on Environment and Development 1987.



ingar eru fyri burðardygga menning innan umhvørvið, sum kunna lýsa støðuna í Føroyum.

### 2. stig: 2011-2015

Annað stig er at fremja tær lógarbroytingar, sum skulu til fyri at staðfesta, at vit umsita tilfeingið soleiðis, at vit varðveita endurnýggjandi tilfeingið og skaða umhvørvið sum minst.

## Orka og veðurlagsbroytingar

Í 2015 skulu 15% av orkunýtsluni stava frá varandi orkukeldum, og útlátið av veðurlagsgassum skal vera 8% minni enn í 1990

Tað ber í sær, at tiltøk verða sett í verk fyri at minka um útlátið av veðurlagsgassum og orkunýtslan frá varandi orkukeldum skal mennast.

### Soleiðis røkka vit málinum

- 15% av allari orkunýtslu skulu stava frá varandi orkukeldum.
- Veðurlagssáttmálin skal setast í verk, so at útlátið av veðurlagsgassum verður avmarkað, og Kyotoavtalan verður løgd fyri Løgtingið til samtyktar.

### Støðan í dag

Føroyar staðfestu í 1993 altjóða veðurlagssáttmálan. Í 1997 varð Kyotoavtalan gjørd, sum er ískoyti til sáttmálan. Endamálið við henni var at bera so í bandi, at útlátið av veðurlagsgassum skuldi minkað innan 2012. Í sambandi við at Fólkatingið setti Kyotoavtaluna í gildi í 2001, varð fyrivarni tikið fyri Føroyum. Hetta varð gjørt eftir áheitan frá Landsstýrinum, og hetta fyrivarni er framvegis galdandi.

Ein kanning av útlátinum í 2001 vísti ein vøkstur í útlátinum síðan 1990 á 11%. Ein uppgerð frá 2005[5] vísir, at øll orkunýtslan í Føroyum í høvuðsheitum er grundað á olju og bensin. 95% av nýtsluni eru jarðrunnin brennievni so sum olja, bensin og petroleum, og 4% stava frá varandi orkukeldum. Á leið helvtin av oljunýtsluni verður brúkt í fiskiflotanum (43,9%). Oljunýtslan á landi stavar serliga frá trimum høvuðsbólkum: Húsarhaldum, ravmagnsframleiðslu og akførum.

### Avbjóðingar og trupulleikar

Tá ið ræður um $CO_2$-útlát, eru størstu einstøku bólkarnir fiskiskip, húsarhald, ravmagnsframleiðsla og akfør. Tí eigur ítøkilig ætlan fyrst at verða gjørd fyri, hvussu minkast kann um orkunýtsluna hjá hesum dálkingarbólkum.

Fyri fiskiskip skal málið vera, at veiðan nýtist ikki at minka, hóast oljunýtslan minkar. T.d. kann betrast um orkuvirksemið, leggjast kann um til minni orkukrevjandi veiðihættir, og minkast kann um flotan. Í veiðuloyvum eiga umhvørvisatlit at vera sjálvsagdur lutur. Tað kann bæði vera við at áseta mark fyri ella skráseting av, hvussu nógv útlát hvørt skip kann hava t.d. fyri hvørt veitt tonsatal, og at tað skal vera ein skylda at taka alla veiðu so sum garnar og skræðu til lands.

Fyri húsarhald er serliga talan um oljunýtslu til upphiting og heitt vatn. Her kundi til dømis verið skift frá oljufýring

[5] Kelda: »Yvirskipaður orkupolitikkur«. Fyrsta útkast til orkupolitik. 30. okt 2006. Vinnumálaráðið.

til fjarhita, og dentur kundi eisini verið lagdur á betri orkuvirksemi í hvørjum einstøkum húsi. Nýtsla av varandi orkukeldum eigur eisini at verða ment. Mælt verður til at stuðla vindorku, hitapumpum, sólplátum og tílíkum.

Setast skal á skrá at minka um oljunýtsluna í sambandi við flutnings- og bústaðarhættir. Stuðul eigur at verða latin til nýggjan umhvørvisútbúnað so sum umhvørvisgóðar bilar, umhvørvisgóð skip, partikkulfiltur og tílíkt.

Stórur partur av endamálinum eigur at kunna røkkast við fíggjarligum stýringaramboðum, og tiltøk á hesum øki eiga at setast í verk. Skipað eigur at verða soleiðis fyri, at inntøkur av møguligum koltvísúrnisavgjøldum kunnu nýtast sum til stuðul til verkætlanir at minka um orkunýtsluna og til at menna orkusparandi skipanir.

Skulu vit minka um útlátið av veðurlagsgassum, mugu vit arbeiða miðvíst og støðugt við hesum, og vit mugu nýta somu orkugóðu amboð sum onnur lond til endamálið. Átøk fyri at minka um koltvísúrnisútlátið eru langtíðarmál, og tí er ein breið, politisk semjaneyðug.

### Ætlan hiðani til 2015

### Stig 1: 2007-2015

Í 2007 eigur at verða farið undir at leggja til rættis ítøkilig átøk, t.d. við fíggjarligum stýringaramboðum so sum avgjøldum og stuðli fyri at minka um útlátið av veðurlagsgassum.

Føroyar skulu strika sítt fyrivarni fyri Kyotoavtaluni og eiga beinanvegin at minka um útlátið av veðurlagsgassum, so at tað innan 2012 er á leið 5% og í 2015 8% minni enn í 1990.

Oljunýtslan skal minkast á øllum økjum – lutfalsliga mest á teimum, sum dálka mest.

Umhvørviskrøv skulu setast, tá veiðuloyvi til skip verða givin. Skipini skulu nýta bestu tøkni, ið er til taks, orkugóðan reiðskap og føra grønan roknskap við fleiri parametrum.

Umhvørviskrøv skulu setast til alla nýbygging, bæði skip, hús og annað. Viðkomandi lóggáva skal lagast til hetta. Í 2015 skulu 15% av orkuni stava frá varandi orkukeldum. Nýggjar orkukeldur skulu stuðlast, t.d. jarðhiti, alduorka o.s.fr. Tøknin skal mennast, og serlig atlit skulu altíð takast til náttúruna.

## Jørð, hav, luft og vatn

Jørð, hav, luft og vatn skulu vera so rein, at tey hvørki eru til ampa ella skaða fyri fólk, fæ, náttúru ella mannaverk

Tað ber í sær, at eitt miðvíst arbeiði skal setast í gongd at verja vistskipanirnar á landi, sjógvi og í jørðini móti ávirkan, sum kann hótta natúrligu javnvágina.

- Dálking av havi og sjógæti skal fyribyrgjast
- Rein luft skal vera allastaðni, í bý sum á bygd
- Vatnið í áum og vøtnum skal vera ódálkað
- Upphópan av skaðiligum evnum skal fyribyrgjast
- Føroysk støðisvirði skulu staðfestast

Fyri at tryggja, at jørð, hav, luft og vatn eru so rein, at tey hvørki eru til ampa ella skaða fyri fólk, fæ, náttúru ella mannaverk, er neyðugt at kenna støðisvirðini í føroysku náttúruni og at ansa eftir, at dálkandi útlát ikki hevur týðandi árin á umhvørvið. Tað merkir, at føroysk støðisvirði skulu staðfestast við kanningum og granskingum, og at ansast skal eftir, at umhvørvisstøðan altíð er góð.

### Støðan í dag

Kunnleiki um góðskuna í havi, luft, jørð og vatni stavar serliga frá arbeiðinum við at skapa eina føroyska umhvørviseftiransingarskipan. Flestu kanningar hava tó verið gjørdar við útlendskari fígging. Alt ov fáar kanningar verða gjørdar við tí í hyggju at finna fram til føroyska støðisvirðið, so at dálkandi útlátsárin kann staðfestast. M.a. tørvar okkum kanningar av luftgóðskuni í bygdum økjum.

Lóggávan fyri umhvørvisøkið er afturúrsigld og ófullfíggjað, løgtingslóg um havumhvørvið undantikin. Ein nútímansgerð av náttúru- og planlóggávuni eigur at verða gjørd. Harafturat vantar týðandi lóggáva, sum avmarkar ella bannar innflutningi, framleiðslu og nýtslu av umhvørvisskaðiligum evnum, umframt lóggáva, ið ásetur, at árinsmetingar skulu gerast, áðrenn farið verður undir størri verkætlanir, og at umhvørvismetingar skulu verða framdar í sambandi við allar størri samfelagsligar og skipanarligar ætlanir.

### Avbjóðingar og trupulleikar

Kunnleikin til góðskuna um jørð, hav, luft og vatn skal mennast. Tað gerst best við at skapa umstøður fyri støðugum og regluligum kanningum undir eini umhvørviseftiransingarskipan. Tørvur er á eini umhvørviseftiransingarskipan, sum hevur støði í føroyskari fígging, og sum javnan kunnger umhvørviskanningar og umhvørvishagtøl/ávísingartøl fyri almenninginum á ein hátt, sum mennir føroyska hugburðin til náttúru- og umhvørvisvernd.

Verandi vitan um føroysk støðisvirði eigur at lýsast, og tilmæli eigur at gerast um, hvør vitan enn vantar í, og hvørjar kanningar eiga at fremjast. Tá vitanin er tøk, ber til at áseta markvirðir fyri, hvussu nógv dálking kann góðtakast í jørð, hav, luft og vatni, serliga, um talan er um útlát, ið eru tengd at náttúruorkuni sum t.d. taðingarevnir. Upphópandi umhvørviseiturevni eiga altíð at avmarkast sum mest og innan fyri karmarnar á altjóða sáttmálum.

Umhvørvisgóðskan skal í minsta lagi vera líka góð sum í øðrum Norðurlondum. Tað hevur týdning fyri ímyndina av Føroyum sum framkomnum samfelagi, at lóggáva og dálkingaravmarkandi skipanir samsvara við norðurlendskar og evropiskar skipanir.

### Ætlan hiðani til 2015

### 1. stig: 2007-2015

Umhvørviseftiransingarætlan skal staðfestast og fíggjast serstakt á fíggjarlógini beinanvegin.

Umhvørviseftiransingin skal mennast, so at í 2010 kann leggjast fram ein greining av føroysku umhvørvisgóðskuni, ávísingartølum og tilmæli til, hvat gerast skal fyri at betra um umhvørvisgóðskuna.

Markvirði, ið eru tengd at náttúruorkuni og støðisvirðum, skulu ásetast fyri dálkandi útlát.

Uppskot til nýggja lóggávu, sum – umframt nýgerð av verandi náttúru-, umhvørvis- og planlóggávu – eisini hevur kemikaliu-, vøru- og umhvørvisárinslóggávu, skal vera tøkt í 2010.

Í framtíðini skal lýsing av gongdini í umhvørvishagtølum regluliga og í minsta lagi fjórða hvørt ár almannakunngerast í lættskiljandi útgávu. Fyrsta útgávan skal koma í 2010.

## Vinna og útlát

Dálkandi útlát skulu skrásetast, stýrast og skerjast

Tað ber í sær, at:

- Virkir skulu seta umhvørvisstýrisskipanir í verk
- Metast skal um fylgjur, sum virksemið hevur fyri náttúru og umhvørvi
- Virkir skulu menna og nýta bestu tøku tøknina fyri at skerja dálkingina
- Arbeiðast skal eftir viðurkendum vinnugreinastandardum
- Vælvirkandi innsavningar- og endurnýtsluskipanir skulu vera fyri bæði vanligt og serliga dálkandi burturkast
- Vøru- og kemikaliunýtsla skal góðkennast, skrásetast og stýrast

### Støðan í dag

Serliga dálkandi vinnur, sum eru stovnaðar eftir oktober 1988, tá ið umhvørvisverndarlógin varð sett í gildi, skulu hava umhvørvisgóðkenning, og fara tá ofta at skráseta dálkandi útlát. Men eingi krøv eru sett til serliga dálkandi vinnur, stovnaðar fyri 1988. Tað finnast tó virkir, stovnað fyri 1988, sum eru umhvørvisgóðkend.

Alivinnuni, oljuvinnuni, brennistøðum og øðrum eru áløgd krøv at skráseta nýtslu, mannagongdir og útlát. Neyvar skrásetingar av dálkandi útláti vanta í fleiri vinnugreinum, t.d. fiskiskapi og landbúnaði. Oljuvinnan er einasta vinna, sum verður kravd at gera EIA-greining (Environment Impact Assessment), og tískil sjálv skal meta um fylgjurnar, virksemið hevur fyri náttúru og umhvørvi.



Tað eru at kalla eingi virkir, sum hava sett umhvørvisskipanir í verk, annað enn tað, sum myndugleikarnir krevja. Viðurkendir vinnugreinastandardir eru ikki kent fyribrigdi her heima.

Sum heild kann sigast, at føroysk virkir hava ikki lagt seg eftir at menna og nýta bestu tøkni fyri at skerja dálkingina. Hinvegin hevur høgi oljuprísurin havt við sær, at virkir – serliga fiskiflotin – veruliga eru farin at kanna, hvussu ein kann spara oljuútreiðslur.

Hvat vøru- og kemikaliunýtslu viðvíkir, er eingin dagførd lóggáva á økinum, og tí kunnu nógvar vørur vera í umfari í Føroyum, sum ikki eru loyvdar í okkara grannalondum.

### Avbjóðingar og trupulleikar

Ein avbjóðing er at fáa øll øki – almenn sum egin – til at raðfesta umhvørvið frammarlaga, og ikki at síggja umhvørvisátøk sum eina óneyðuga útreiðslu og sum krøv, sum forða fyri búskaparligari menning.

Góð hagtøl mugu fáast til vegar, og avbjóðingin er síðan at fáa greiðu á, hvussu stór umhvørvisátøkini skulu vera. Umhvørviskrøv mugu setast við skili, og ansast skal eftir, hvat átøkini kosta í mun til nyttuvirðið.

Avbjóðingin verður somuleiðis at gera fiskiveiðuna umhvørvisbetri og burðardyggari.

### Ætlan hiðani til 2015

### 1. stig: 2007-2010

At kortleggja, hvussu nógv tær ymisku vinnurnar dálka,

teirra millum heilsuverkið og aðrar vinnur. Til hetta hoyrir at skráseta útlát, so at Føroyar kunnu røkja sínar fráboðanarskyldur sambært altjóða sáttmálum. Áðrenn hetta verður gjørt, má ein allýsing gerast fyri, hvussu útlátini skulu mátast. At seta mál fyri, hvussu nógv útlátið frá ymisku vinnugreinunum skal skerjast, og saman við vinnuni gera eina ætlan fyri, hvussu hetta kann fremjast.

### 2. stig: 2007-2015

At stuðla gransking og menning av bestu tøknini og eggja vinnufyritøkum til at seta umhvørvisstýrisskipanir í verk. At góðkenna og stýra vandamiklari og dálkandi vøru- og kemikaliunýtslu.

### 3. stig: 2007-2015

At krevja, at alt dálkandi virksemi skal hava eina umhvørvisgóðkenning.

### 4. stig: 2007-2015

At lata umhvørvisskipanir og metingar um fylgjur fyri náttúru og umhvørvi gerast ómissandi lut í viðgerðini, tá ið loyvi og góðkenningar verða givin til virksemi í vinnugreinum, sum verða mettar at skaða umhvørvið.

## Alment og kommunalt virksemi

Umhvørvisatlit skulu takast í mun til alt alment og kommunalt virksemi

Tað ber í sær, at:

- Landið og kommunurnar skulu orða umhvørvisætlanir, sum allar uppgávur skulu leggjast til rættis og útinnast eftir
- Arbeiðið, sum verður latið upp í hendurnar á eginfyritøkum at leggja til rættis og útinna, skal somuleiðis gerast sambært umhvørvisætlanum
- Eginvinnufyritøkur, sum hava eina virkandi umhvørvisstýrisskipan, eiga at hava fyrimun fram um aðrar at fáa almenn og kommunal arbeiði, tá hesi verða útboðin

### Støðan í dag

Umhvørvisætlanir eru orðaðar ætlanir hjá landi og kommunum, sum millum annað miða ímóti at minka um tilfeingisnýtsluna og útlátið í vatn og luft frá almennum og kommunalum virksemi. Ein umhvørvisheildarætlan fyri virksemið hjá tí almenna finst ikki í dag.

Flestu kommunur hava ongantíð havt nakra orðaða umhvørvisætlan. Kommunurnar, sum síðst í nítiárunum orðaðu eina slíka, hava annaðhvørt bert lutvíst fylgt síni ætlan, ella hava nátt teimum málum, sum sett vórðu, men hava ikki endurskoðað ella dagført tær.

### Avbjóðingar og trupulleikar

Umráðandi er, at tað almenna og kommunur fáa fakliga vegleiðing til at gera umhvørvisætlanir, og at tær haraftúrat leggja seg eftir at ganga fremst í hesum arbeiði. Virksemi teirra er stórur partur av virkseminum í landinum, og almennu- og kommunalu Føroyar kunnu á henda hátt ganga á odda á hesum øki og vísa øðrum vegin. Ein onnur avbjóðing hjá landi og kommunum er at geva sær far um dálkingarvandarnar frá vinnuligum og almennum virksemi og at brúka hesa vitan til at leggja lendis- og býarskipanina soleiðis til rættis, at vandin fyri náttúru- og umhvørvisdálking gerst so lítil

sum gjørligt. Harumframt eiga tilbúgvingarætlanir at verða gjørdar, har mannagongdir eru fyri, hvussu lands- og kommunualir myndugleikar bera seg at, tá ið dálking kann skaða náttúruna og umhvørvið í kommununi.

### Ætlan hiðani til 2015

### 1. stig: 2007-2010

Kommunurnar arbeiða við at orða umhvørvisætlanir.

Ein bólkur verður settur at arbeiða við at orða eina umhvørvisætlan fyri virksemið hjá tí almenna.

Kravt skal verða, at alt dálkandi virksemi skal hava eina umhvørvisgóðkenning.

### 2. stig: 2010-2015

Krøv verða sett til eginfyritøkur, ið gera arbeiði fyri tað almenna og kommunur, at tey skulu gerast sambært umhvørvisstýrisskipanum, sum stýra tilfeingisnýtslu og útláti í mun til útbodna arbeiðið.

Umhvørvisætlanir hjá kommunum og tí almenna verða eftirmettar og endurskoðaðar regluliga.



## Kunning og samskifti

Upplýsing og kunning til tann einstaka borgaran um náttúru og umhvørvi skal økjast

Tað ber í sær, at:

- Upplýsing og vegleiðing skal kveikja áhuga og tilvitan um náttúru og umhvørvi
- Átøk sum til dømis grønir skúlar og tílíkt skulu fremjast fyri at stimbra tilvitanina til náttúru og umhvørvi millum børn og ung

### Støðan í dag

Sum er, finst lítið av upplýsing og vegleiðing til borgaran um umhvørvi og umhvørvisvernd. Nakrir skúlar hava í nøkur ár verið riknir sum grønir skúlar. Teir hava tó ikki – eins og líknandi skúlar í grannalondum okkara – verið partur av altjóða skipan fyri slíkar skúlar.

Í dag finst lítið av kunning á føroyskum um umhvørvi og umhvørvisvernd, ætlað til fólkaskúlan. Tað tilfar, sum finst, eitt nú á donskum, er bert partvíst nýtiligt til føroyskar umstøður.

### Avbjóðingar og trupulleikar

Nógvir partar eru inni í myndini, tá ið ræður um upplýsing og vegleiðing á umhvørvisøkinum, og hetta hevur við sær, at upplýsingin í onkrum førum er í so tilskilað, í øðrum førum ov grunn og í versta føri endurtakandi, tá ið fleiri partar kunna um sama evni. Orkan til umhvørvisupplýsing og umhvørvisvegleiðing kundi tí verið nógv betur nýtt, um arbeiðið varð samskipað. Lagt verður tískil upp til at arbeiða fram ímóti einum samstarvi millum verandi partar á økinum longu í 2007. Á henda hátt kunnu vit fáa eina samskipaða og betri vegleiðing og upplýsing á umhvørvisøkinum í framtíðini.



Tá ið tað kemur til grønar skúlar, er ein av avbjóðingunum at skipa fyri samstarvi millum lærarar og kommunur á hvørjum einstøkum skúla. Undirvísingartilfarið til skipanina í Føroyum eigur at vera á føroyskum máli og lagað til føroysk viðurskiftir. Hvat viðvíkir luttøku hjá grønum skúlum í einari altjóða skipan, eigur hetta at verða greinað.

Umráðandi er, at tilvitanin um náttúruna og umhvørvið verður løgd niður í børnini frá barnsbeini. Tí verður ein av avbjóðingunum eisini at seta í verk umhvørviskunning og umhvørvisundirvísing fyri børn undir skúlaaldri.

### Ætlan hiðani til 2015

#### 1. stig: 2007-2009

Skipað verður eitt samstarv millum verandi partar á upplýsingar- og kunningarøkinum viðvíkjandi náttúru og umhvørvi.

Ein skipan fyri grønar skúlar verður sett á stovn.

Umhvørviskunning og umhvørvisundirvísing verða sett á stovn fyri børn undir skúlaaldri.

#### 2. stig: 2009-2012

Í samstarvi við verandi partar á økinum verður skipaður ein meginstovnur, sum skal taka sær av at upplýsa og kunna um náttúru, umhvørvi og heilsu í Føroyum.

Arbeitt verður við at gera og útgeva undirvísingartilfar til grønar skúlar á føroyskum. Tilfarið skal vera lagað til føroysk viðurskifti.

Tilfar verður fingið til vegar um náttúru og umhvørvi til børn undir skúlaaldri. Tilfarið skal vera á føroyskum og lagað til føroysk viðurskifti.

#### 3. stig: 2012-2015

Miðað verður ímóti, at flestallir fólkaskúlar og barnagarðar eru grønir í 2015.

Kunningin til borgaran um náttúru, umhvørvi og heilsu er á einum høgum stigi og málrættað til føroyingar og føroysk viðurskifti.



## Fyrisiting og gjøld

Umhvørvis-, lendis- og náttúrumál verða løgd í eina umsiting, sum er før fyri at fremja málini

Tað ber í sær, at:

- Ein høvuðsfyrisiting fyri náttúru-, lendis- og umhvørvismál skal verða savnað og styrkt
- Høvuðsfyrisitingin skal fyrisita sítt málsøki og veita ráðgeving til aðrar myndugleikar og stovnar tvørtur um ráðs-, stovns- og kommunumørk
- Lóggávan skal verða dagførd og smíðað, so til ber at røkka settum umhvørvismálum í 2015
- Skráseting, hagtøl, eftirkanningarskipanir og gransking skulu brúkast sum amboð til at staðfesta og fylgja við útlátinum, dálkingarstøðuni, korunum hjá vistskipanum, plantum og djórum umframt at fyrisita skyldur Føroya móti umheiminum sambært altjóða sáttmálum

### Støðan í dag

Eingin heildarfyrisiting fyri umhvørvi, lendi og náttúrufyrisiting er í dag.

Fyrisitingin av umhvørvisøkinum er lutað út á fleiri myndugleikar. Umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu starvsstovuni fyrisitur tann partin av umhvørvisverndarlógini og havumhvørvislógini, sum sambært kunngerð ella skrivi er lagdur til hennara. Ein stórur partur av umhvørvismálum verður fyrisitin av kommununum, t.d. sambært kunngerð um umhvørvisreglur. Tað, sum eftir er, liggur hjá Innlendismálaráðum.

Leikluturin hjá ráðnum í fyrisitingini av lendismálum er fyrst og fremst at góðkenna byggisamtyktir, eftir at hesar eru viðgjørdar av byggi- og býarskipanarnevndini.

Innlendismálaráðið hevur at kalla ongan leiklut í fyrisitingini av náttúrumálum. Her eru tað fyrst og fremst friðingarnevndirnar, ið taka avgerðir.

Í dag eru heilt fá gjøld, ið eru áløgd grundað á umhvørvispolitisk fyrilit. Nevnast kunnu tó gjøld fyri burturbeining av olju og bilvrakum. Heldur ikki verða gjøld nýtt til at stýra nýtslu av dálkingarevnum. Meginparturin av fyrisitingini innan fyri karmarnar á løgtingslóg um umhvørvisvernd verður goldin av landskassanum, millum annað fyri at geva umhvørvisgóðkenningar og at útinna eftirlit. Hetta er eitt øki, sum aðrastaðni er kostnaðarsett, og sum tí eisini er kostnaðarsett í havumhvørvislógini.

### Avbjóðingar og trupulleikar

Ein yvirskipað ætlan fyri nýtslu av lendi og økjum í landinum er ein týdningarmikil liður í at verja náttúruna. Hetta eigur tí at verða gjørt sum skjótast.

Lógargrundarlagið á økinum eigur í hesum sambandi at verða samskipað, og nýggj náttúruverndarlóg eigur at verða gjørd.

Skráseting, hagtøl, eftiransingarskipanir og gjøld skulu oftari enn nú nýtast sum amboð til at stýra náttúru- og umhvørvispolitikkinum.

## Ætlan hiðani til 2015

### I. stig: 2007-2015

Avgjøld skulu tillagast, so at minni avgjøld eru á vørum, amboðum og øðrum, sum dálkar lítið, enn á slíkum, sum dálkar meira.

Avgjøld á dálkingarevni og tilfar skulu vera við til at fíggja útreiðslur, sum almennu Føroyar hava av eitt nú at skráseta útlát, fylgja dálkingarstøðuni, burturbeining og tílíkum.

Konkurslógin skal verða broytt, so at gjøld fyri upprudding verða javnsett við krøv, ið hava framíhjárætt í trotabúgvum.

Gjøld skulu ásetast fyri fyrisiting og eftirlit við serliga dálkandi vinnugreinum.

Virksemi, ið krevur góðkenning og eftirlit, skal sjálvt gjalda kostnaðin av hesum. T.e., at umhvørvisfyrisitingin skal krevja tímakostnað ella seta í verk góðkenningar- og eftirlitsgjøld. Hetta eigur at verða sett í verk beinanvegin.

Lýsing eigur at verða gjørd av best egnaðu umhvørvisavgjøldum, og hvussu tey skulu umsitast.

Nýggj náttúruverndarlóg eigur at vera liðug í 2008. Lóggávan á náttúru-, lendis- og umhvørvisøkinum annars eigur at vera liðugt endurskoðað í 2010.

Longu í ár verður avgjaldslóggávan broytt, so at hon eggjar til at dálka sum minst.

Í 2015 skulu 2,015% av fíggjarlógini nýtast til at skapa røttu karmarnar fyri vinnulív, borgarar og myndugleikar, so at vit í felag kunnu arbeiða fram ímóti sama aðalmáli, sum er, at umhvørvið skal vera frítt fyri mannaelvdari dálking og náttúruinntrivum, sum kunnu hótta heilsu menniskjans og fjølbroytni og vakurleika náttúrunnar.

Hesi vóru í strategibólkinum fyri umhvørvi:

Rúni Joensen, aðalstjóri, Innlendismálaráðið, formaður
Anni á Hædd, stjóri, Tilbúgvingarstovnur Føroya
Dánjal Petur Højgaard, studentaskúlalærari
Bergmann Finnsson, Agenda 21 Stovan
Guðri Andorsdóttir Ellefsen, góðskuleiðari, United Seafood
Jákup Pauli Joensen, deildarstjóri, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Janet Fríða Johannesen, stjóri, Atlanticon